KLAVER TIL SØLU
Svenskt Nylund & Son, myrkabrún træfarva, 1 m. høgt, ca. 15 ára gamalt, krakkur við skuffu fylgir við. Gott til børn: lágt nótastativ og høgan krakk. Stendur í Havn. Ca. 18.000,- ella hægstbjóðandi.
Tlf. 214433

TIL SØLU
Akai samplari, Emu samplari, Atari tónleikatelda, Roland JK-3p, Synth., Arp omni-2 synth. Moog prodigy Yama DX-7 synth. Egmond hálvakk. guit., sjáldsamur Ampeg plexibassur, Djembe.
Tlf. 225537

YNSKIST
Trummusett ynskist til keyps.
Tlf. 444212 - 254814

STEREOANLEGG
Ein Pioneer forsterkari 2 x 100w, Ein Pioneer CD-spælari og 2 JBL 150w hátalarar. Bíliga til sølu, SKAL seljast. Hygg/hoyr nærri á
Tlf. 220284

FLØGUR YNSKJAST
Eg havi danskar og útlendskar fløgur, bæði brúktar og óbrúktar. Eg leiti eftir føroyskum fløgum.
Tlf. +45 86428627, +45 26747474, fax +45 86411111

TRUMMUSETT
Brúkt trummusett ynskist bíliga til sølu.
Tlf. 315630

TIL SØLU
Eitt gott JVC bilstereo. Prísur: 1.500 kr.
Tlf. 222292

Út- & Sjónvarp

SONY STR-DE875
Ein Sony STR-DE875 sourround fersterkari og ein Toshiba DVD avspælari bíliga til sølu ring á
tlf. 229550

Ymiskt

TIL SØLU
Eitt eitt ára gamalt Olympus myndatól til sølu. Hevur 35-120 mm zoom, fyribyrgjan móti "reyðum eygum" og nógvar aðrar møguleikar. Nýprísur 1800 kr. Til sølu fyri 1000 kr.
Tlf. 322292/227645

GRÓT TIL SØLU
Sprongt grót úr Skotarók til sølu. Prísur, 400 kr lessið, uttan koyring.
Áhugaði ring 213842

TIL SØLU
Eitt Pentax MZ-50 myndatól við einari 28-80mm Sigma linsu til sølu fyri 2000 kr. Nýprísur 3500 kr. Myndatólið hevur autofokus og nógvar ymiskar møguleikar.
Tlf. 322292/227645

TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst verður grillbarrin í Hvalba seld. Grill-barrin er útgjørd við allari vanligari grillútgerð. Harumframt er: Sjónvarp við fylgisveina-móttakara. Soft-ice maskina, sum ger stríputar ísar. Fartelda. Eyka grillútgerð. Eisini selist restgoymslan, ið umfatar grillvørur, góðgæti og drekkivørur verður seld. Alt selist best saman. Áhugað kunnu venda sær til: Heno, Tlf. 375555, Box 10, FO 850 Hvalba
E-mail: heno@post.olivant.fo

MARKNAÐARDAGUR
verður í Ítróttarhøllini í Runavík 30.11.02 Tilmelding á tlf. 447655.
NSÍ

FRÁ ASTMA/ALLERGIFELAGNUM
Um nóg nógv tekna seg verður jólahugni í MBF-húsinum 30. nov. kl. 17.00. Til matna verður smyrjibreyð, kaffi og køkur. Øll eru vælkomin. Tilmelding á tlf.
213232/456986

GESTAKOKKUR Í HVALBA
Leygarkvøldið 23. november kl. 19.30 verður jólaborðhald í Roynhøllini. Uni Gullfoss, gestakokkur úr Havn, borðreiðir við marineraðari dunnubringu, heilstoktari lambasteik og heimabakaðari hunangskaku. Aftan spælir ELM band góðan dansitónleik. Atgongumerki á 200 krónur, fáast í pylsuvogninum í Hvalba, í Tangabúðini á Tvøroyri á Statoil í Vági og á tlf.: 375304. Seinasta freist at keypa atgongumerki er mikukvøldið.
Royn

BILLARDBORÐ
stødd - 3/4 – í góðum standi. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 371081

NOKIA 3310
Við 2 eyka frontum til sølu fyri 800 kr, sera vælhildin og litið brúkt.
Tlf. 214789

EIN GÓÐ SÓL
bíliga til sølu, hevur undirpart og yvirpart. Myntbox fylgir við.
Tlf. 221778

FARTELEFON
Nokia 5110 við leðurhúsa og ladara til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 255279 ella 316016

ÚTHURÐ
til terassu/altan v/ sprossarútum, 200x100, til sølu.
Tlf. 311612

JÓLASØLAN
hjá Verkhúsinum Stíggjur í Saltangará verður á Stíggjanum leygardagin 23. nov. frá kl. 10–15.00.
Tlf. 448944

SÓL
(yvirpartur) til sølu.
Tlf. 441642

SKY DIGITAL
SKY DigiBox og Kort, kan skaffast. Við SKY Digital kanst tú síggja tildømis SKY Sport, SKY Movies og nógvar aðrar góðar kanalir..e-maila og fá meira at vita.
E-postur: jan@kallnet.fo

VINDILTRAPPA!
Innandura vindiltrappa úr stáli við lakeraðum trinum úr massivari bók til sølu fyri hægsta boð yvir 5.000 kr. Hædd: 2,60 m, diametur 1,35 m.
Tlf. 32 03 02 ella 21 37 51

HEY
Er tað nakar, ið vil garva tvey skinn fyri meg fyri rímiligan prís.
Tlf. 222790

FERÐ FYRI 2
við bíli til DK við Norrønu vetrarhálvárið kr. 2000,-
Tlf. 252895

MOTOROLA CD 160
GSM fartelefon, lítið brúkt, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 317785 ella 263874

SONY DIGITALKAMERA
nýtt óbrúkt Sony digitalcamera við øllum hentleikum til sølu fyri 8.500 kr. (Nýprísur 11.500 kr.)
Tlf. 317785 ella 263874

HARUSKJÓTING
í Saksun – fast gjald fyri mannin.
Tlf. 422288

FARTELEFON
Siemens C25 v/ løðitóli, billøara og haldara bíliga til sølu.
Tlf. 216164

TIL ALLAR FJALLMENN Í KUNOYNNI
Fjalldogurðin verður í Bygdahúsinum í Kunoy leygardagin 23.11.02 kl. 19.00. Tekning á tlf. 223570 ella 457419.
Bygdafelagið Vesturskin og Ljósið

KSR-VEITSLA
Veitslan verður leygarkvøldið 23. nov. kl. 19.00. Kostnaður: Limir: 180,- kr. Gestir: 240,- kr.
Kvívíkar Sóknar Róðrarfelag

RULLUSKOYTUR TIL SØLU
Supreme Turbo 33 classic str. 39 v/ 62 mm aerobic hjólum 800,- kr. Risport str. 40-41 v/ Kryptos hjólum 400,- kr.
Tlf. 310215

TIL SØLU
Frystiboks v/ glasloki, 1500,-. Meto prísmaskina 700,-. Reklamuútiskelti 500,-. Sigarettstativ 800,-.
Ring 259115

MOTOROLA V66
Lítil og snøgg fartelefon, vigar bert 79 gr. Skermurin kann skifta lit og hevur allar teir nýggjastu hentleikar. Prísur 2.700,- Nýprísur 5.000 kr.
Tlf. 266020

TIL SØLU
Nokia 3410 fartelefon. Prísur 1900.-
Ring 210002

HEILSANIR

Góði, elskaði abbi og pápi
Hjartaliga tillukku við 75 ára degnum. Takk fyri alt tú hevur verið fyri okkum.
Kærar heilsanir Henrik og Brian

Góði babba
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við tínum stóra degi 18. nov. Vit elska teg.
Heilsan tríggir gullklumpar

Góða omma og mamma
Hjartaliga tillukku við 55 ára degnum. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Tú ert tann besta.
Heilsan børn og barnabørn

Góða kona
Tillukku við 55 ára degnum. Nú eru árini, vit hava verið saman, mong, men fyri mær er tað sum fyrstu ferð eg sá teg.
Maður tín

Heilsanir 30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

TILTØK

Tórshavnar Sjómansheim
Evangel. møti v/ Vibeke Schaffalitzky og Inger J. Hildershavn verður í kvøld 19. nov. kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Ebenezer
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hóskvøldið kl. 20.00 Kvinnumøti har Anna Fuglø Rodda verður við og ungdómsmøti kl. 20.00.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Hebron, Argir
Mikudagin kl. 20.00 Vit savnast í húsbólkum.
Kontaktpersónur: Mai L. Simonsen, tlf. 315226.
Heimasíða www.hebron.fo

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Konfirmatión av Mariu Magnussen verður sunnudagin kl. 11.00 v/ Biskop Czeslaw Kozon í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Kl. 14.00 Sunnudagsskúli.

Meinigheitshúsið
Týskvøldið kl. 20.00 Bíbliutími, Lukas kap. 23, vers 26-49.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Jógvan Petersen.
Leygarkvøldið kl. 19.30-22.00 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, 18.00 Møti við Regin Olsen, Meinigheitskórið syngur.

KFUM og KFUK í Havn
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børnini.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Í annaðkvøld kl. 19.00 Delli. Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Samkoman Immanuel
Mikukvøldið kl. 20.00 Møti.

Zion, Kollafjørður
Ungdómsmøti við Onnu Fuglø og David Rodda verður leygardagin 23.11. kl. 20.00. Hugnaløta við drekkamunni verður aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygardagin kl. 17.30-19.30 juniorarbeiði fyri børn 3.-7. flokk.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús, ung luttaka.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Osbjørn Joensen, barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í Kelduna, www.keldan.fo

Missiónshúsið í Skopun
Í dag kl. 16.00 venja gentur frá 1. flokki og uppeftir Santa Lucia.
Mikudagin kl. 20.00 Bíbliutími.
Hóskvøldið kl. 20.00 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Allar kvinnur vælkomnar.

Betania, Skopun
Mikudagin kl. 20.00 Bíbiltími við Einar Joensen.

Soli Deo Gloria
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Hjørdis og Dánial Petersen.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.

Betel, Vágur
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur.

Dagtilhaldið í Vági
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

Dagtilhaldið Fløvin
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319630/61655400.

Pensionistafelagið í Havn
kemur saman hvørt mikukvøld í Losjuni, Tinghúsvegur 18, kl. 19.00, við ymiskum tiltøkum. Uml. eina ferð um mánaðin hava vit bingo, tá byrja vit kl. 18.00. Øll, sum eru 60 ár og eldri og búgva í Tórshavnar kommunu eru vælkomin at gerast limir. Tygum kunnu ringja til Gunleyg á tlf. 312864 ella Karin á tlf. 311244. Mikudagin 27. nov. hava vit jólasølu, tombola og kafé. 4. des. hava vit jólabingo. 11. des verður jólahugni og søla av lutaseðlum 18. des verður jóleveitsla á Hotel Hafnia.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 18. nov.:
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 **Ítriv vit hugsa um jólini**
Alla vikuna verður framsýning í kjallaranum av nálatøvdum lutum.
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobspæl, dart og onnur spøl
Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
Týsdagin 19. nov.:
kl. 10-12 Vit baka til jóla
kl. 10-11.30 Vit syngja, Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 **Vælgerðarmerkir.** Suni Vinther og Álvur Danielsen. **Vitjan frá Føroya Fólkaháskúla.**
Mikudagin 20. nov.:
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 15 Túrur. Sjá skránna í bløðunum
Hósdagin 21. nov.:
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17.00 **Virka til jóla**.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 22. nov.:
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við aftur-venjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

AA-fundir í Havn
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20.00-21.30.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvitaskúla. (gamla læraraíbúðin)

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy/Vágur
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsariínum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

Føroya Heimavirksifelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
Skrivstovan Listafólkasamband Føroya í Pætursarstovu, er opin allar gerandisdagar frá kl. 9-12. Limir eru vælkomnir inn á gólvið.
tlf: 320197
teldupostur:lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Sveiki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
Fibromyalgibólkurin: Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
Foreldraumboð:
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
Ungdómsumboð: Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild,
e-mail:
torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

Javni
Skrivstovan er opin týsdag til fríggjadag kl. 10.00-14.00.
Adr.: Hoydalsvegur 40, 3. hædd.
Tlf. 314827 – fax 310557
Teldupostur:
javni@post.olivant.fo
Heimasíðan www. javni.fo

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 317959, telefax 315727.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

GULLBRÚDLEYP

Týsdagin 26. november hava Elin og Hans Petur Brekkstein, Velbastað, verið gift í 50 ár. Leygardagin 30. november kl. 11.00-17.00 eru øll vælkomin í Pálsstovu, Mykinesgøta 7, Tórshavn.

SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 10. des. hava Poula og Tórmund Hansen á Skála verið gift í 25 ár. Veitslan verður hildin í Ítróttarhøllini á Skála kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 441681 ella 255158 í seinasta lagi 3. desember.

BRÚDLEYP

Leygardagin 23. november kl. 13.00 giftast í Gideon Vestmanna, Alice Simonsen, Sørvágur og Finnbjørn Garðalíð, VEstmanna. Borðhaldið verður fyri innbodnum á Hotel Vágum kl. 17.00. Kl. 21.00 verður opið hús í heiminum í Sørvági, har øll eru hjartaliga vælkomin. Møguligt verður hjá avbygdafólki at sleppa heimaftur.

Leygardagin 4. januar kl. 17.00 giftast í Vesturkirkjuni Margreta Dam, Argir og Brynjer Gregoriussen, Tórshavn. Veitsla verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu verða vinarliga biðin um at ringja á tlf. 213065 ella 313054 innan 20. desember.